# Ársfrásøgn 2017

Her greiða vit í stuttum frá nøkrum av tí virksemi, sum hevur verið í 2017. Sambært viðtøkunum skal Ráðið fyri Ferðslutrygd í fyrsta lagi gera ferðsluna tryggari við at betra *ferðsluvanarnar* við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi við støði í Nullhugsjónini.

## Deyð í 2017

í 2017 doyðu tveir menn í føroysku ferðsluni. Annar ein 24 ára gamal motorsúkklukoyrari í vanlukku á Vestmannavegnum, og hin ein 41 ára gamal bilførari í vanlukku í Líðini á Tvøroyri. Báðar vanlukkurnar vóru sostatt á landsvegi.

Tvey deyð er nakað undir 10-ára-miðaltalið fyri deyð í føroysku ferðsluni, sum pr. 31. desember 2016 var 6,96 pr. 100.000 íbúgvar. Norðurlendsk hagtøl fyri 2017 eru tíverri ikki tøk enn.




Kelda: Landsverk

Talvan vísir, at í Føroyum doyðu flest í ferðsluni í mun til fólkatalið, bæði fyri 2016 og tá vit rokna 10 ára miðal. Í Noregi doyðu í 2016 2,54 og Danmark 3,77 pr. 100.000 íbúgvar. 10 ára miðal fyri Føroyar í 2016 er 6,96.

At tað í 2017 eru færri eru deyð enn í miðal, er jaligt, men vit eru langt frá málinum um null deyð í ferðsluni. Og vit liggja munandi aftanfyri tey, sum vit helst vilja samanbera okkum við, nevniliga Noreg, Svøriki og Danmark.

### Ferðsluóhapp við fólkaskaða

Nullhugsjonin snýr seg eyðvitað eisini um tey, sum fáa álvarsligt mein í ferðsluni. Á niðanfyristandandi talvu eru tøl á óhappum/vanlukkum, har løgreglufólkið á staðnum metti, at onkur skuldi á skaðastovuna. Her verður ikki skilt ímillum tey sum vístu seg óskadd og tey, sum verða 100% óarbeiðsfør. Kortini er rákið er greitt á talvuni, at talið á ferðsluóhappum

við fólkaskaða er minkað. Men vit vita einki um, hvussu stórur partur av hesum eru álvarsliga skadd, ella í hvønn mun talið á álvarsliga skaddum er minkað.

Kelda: Landsverk við støði í hagtølum frá Føroya Politi




## Landsfevnandi átøk í 2017

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í 2017 framt átøk viðvíkjandi ferð, rúsdrekkakoyring, endurskinum til ung, sløktum baklyktum, ferðsludøgum fyri 8. flokkum, súkkluhjálmum, endurskinsvestum. Til nøkur av átøkunum vóru kommunur bodnar við. Eisini er komið í lag fleiri samstørv við fyritøkur í sambandi við átøk.

### Halt hámarsferðina – áðrenn tað er ov seint

Saman við Betri Trygging mintu vit føroyingar á at halda hámarksferðina. Átakið tók støði í filminum, ‘Hin dagin eg hevði skund’. Gallupkanning frá mai 2017 vísti, at 47% av føroyingum søgdu seg vanliga halda hámarksferðina. Hetta er hægsta talið síðan RFF í 2012 fór undir regluligar kanningar av hesum slagi. Tað er lítil kynsmunur millum, hvussu skjótt fólk siga seg koyra. Tó at fitt er eftir á mál, er hetta ein stórur vøkstur upp á lutfalsliga stutta tíð.




**... men fleiri staðni koyra 60% av bilunum skjótari enn 80 km/t**

Landsverk ger mátingar ymsastaðni kring landið, hvussu nógvir bilar koyra og hvussu

skjótt. Greitt er, at summa staðni eru heilt nógvir bilar, ið koyra skjótari enn loyvt. Fleiri staðni eru 60% av bilunum, sum koyra skjótari enn 80 km/t. Her er ofta talan um bein strekki, men hetta eru samstundis vegir, har yvirhálað verður. Føroyskir landsvegir eru bygdir til 80 km/t.

**24% av føroyingum mæla til sjálvvirkandi ferðeftirlit**
Spurd, hvat føroyingar halda besta háttin vera at fáa bilførarar at halda hámarksferðina, vísir gallupkanningin frá mai 2017, at á fyrsta plássi við 24% liggur sjálvvirkandi ferðeftirlit, har mynd verður tikin at bilføraranum. Hetta er skipanin sum vit kenna frá øðrum europeiskum londum. 21% mæla til hægri bót og meira politieftirlit.

**Kommunur tóku undir**
Fyri at geva átakinum størri slagmátt bjóðaðu vit kommunum at vera við. Seks kommunur tóku av at hava skelti á kommunuvegum við sama boðskapi sum í filminum: Tórshavnar -, Runavíkar -, Vága -, Fuglafjarðar -, Nes - og Vágs kommuna. Í eftirmetingunum vístu kommunurnar á, tað hevði verið viðkomandi at samstarvað um ferð, og tær flestu kundu eisini hugsað sær tilsvarandi átøk um *rúsdrekka, skúlabyrjan og gáloysni*. Eisini varð víst til samstarv um ungdóm á prutli, súkklur og eldri. Men her varð eisini hugsað um annað samstarv enn vegplakatir.






## Steðga rúsdrekkakoyring í juli og desember

Trygd og Ferðslutrygd mintu føroyingar á at steðga rúskoyring, har bygt var á filmin, 'Ein skeiv avgerð kann broyta nógv ... kanska alt'.







Gallupkanning vísti enn einaferð, at føroyingar vilja ikki vita av rúdsrekkakoyring. Heili 92% siga, at rúsdrekkakoyring kann "ikki" ella "als ikki" verða góðtikin. 6% svara, at rúsdrekkakoyring skal helst ikki koma fyri. Í Ferðslutrygd eru vit ikki bilsin. Hugburðurin ímóti rúsrekkakoyring er óvikiligur millum tey flestu. Men hjá summum kann vera langt frá hugburði til atferð. Tí rúsdrekkakoyring er framvegis orsøk til álvarsligar ferðsluvanlukkur.

Umframt at filmurin varð vístur á portalum, bar eisini til at fáa plakatir, klistrimerki og tatoveringar við sama boðskapi.




## Supernova - endurskin skapa stíl

RFF fær javnan áheitanir frá bilførarum og foreldrum, sum vilja hava okkum at virka fyri, at fólk til gongu brúka endurskin myrku tíðina. Flestøll eru samd um, at børn eru fús at brúka endurskin, meðan ungfólk ikki vilja vita av teimum. Vit kannaðu støðuna hjá tannáringum til endurskin. Hetta við fokusbólki. Her eru nakrar av niðurstøðum teirra:




Niðurstøðurnar hjá fokusbólkinum gjørdist íblástur til 'Supernova', sum Betri Trygging stuðlaði. Supernovuendurskin eru øðrvísi prýðilig, samstundis sum tey gera fólk til gongu sjónlig í myrkri. Endurskinið er ein brossja uttan reklamur. Supernovuendurskinið er fest á eitt postkort, ið Guðrið Syderbø, grafikari og listakvinna, sum eisini virkar undir navninum *Gurilla*, hevur sniðgivið. Sniðgivin eru fýra ymisk postkort til tey fýra endurskinini:






Á baksíðuni á postkortininum ber til at skriva navn og bústað. Síðani kunnu fólk lata tað í postkassan og senda einum vini - ókeypis. Standarar stóðu beint við kassan í útvaldum klædnahandlum kring alt landið.

**Móti í myrkri - mótaframsýning í p-kjallaranum í SMS**

18. oktober vórðu Supernovuendurskinini lanserað við eini øðrvísi mótaframsýning við nýggja vetramótanum frá handlunum í SMS sett saman við nýggju endurskininum. Hetta fyri at vísa, hvussu tey kunnu nýta nýggju endurskinini sum 'accessory' ella tilhoyr til klæðir. Allur parkeringskjallarin var myrkalagdur, og kjallaragólvið varð eitt langt catwalk. Billyktirnar frá einum bili var einasta ljóskeldan til framsýningina. Antony Charles diskaði. Aftaná mótaframsýningina var ókeypis 'goodie-bag' og okkurt til matna. Eini 3-400 ungfólk

høvdu leitað sær til mótasýning í myrkri. Ein lookbook varð eisini framleidd við myndum, ið Benjamin Rasmussen hevði tikið.




**Áminning um sløktar baklyktir**
Tað kann skapa vandamiklar støður, tá bakljós ikki eru tendrað í til dømis skýming, regni og mjørka, og bilar aftanfyri ikki síggja teg. Tað er ikki óvanligt at síggja bilar, ið koyra myrkir aftan. Ein partur av orsøkini er, at ES inntil í 1. juli 2016 bert setti krav um at framlyktir tendraðu sjálvvirkandi, tá tú tendrar bilin. Hetta var galdandi fyri bilar framleiddir frá 2011. Ein av grundgevingunum var, at minkaða nýtslan av bakljósi skuldi hava jaligt árin á umhvørvið við minni nýtslu av brennievni og harvið minni CO2-útláti.




Nakrir bilar eru soleiðis innrættaðir, at bakljósini tendra sjálvvirkandi, tá tað tørvar. Í øðrum verður bilførarin mintur á at tendra ljósið, til dømis við at ljósið í tólborðinum sløknar. Trupulleikin við summum av bilunum er, at bakljósini ikki tendra sjálvvirkandi, fyrr enn tað er rættuliga myrkt. Hetta sæst serliga í skýming, toku, kavaroki ella lutvís upplýstum tunlum, við tað at her tenda bakljósini ofta ikki.

Tað er eyðvitað at gloyma, tá vit í mong ár hava verið von við, at ljósini altíð tendra sjálvvirkandi. Harumframt er tað ikki ólógligt at koyra við sløktum bakljósum, tá tað er ljóst. Trupulleikin er, tá tað skýmir, fer at regna ella tú koyrir inn í ein tunnil. Tá er ikki altíð, at bakljósini tendra í bilum framleiddir millum 2011 og 1. juli 2016.

Frá 1. juli 2016 kom ES-regla í gilidi, sum álegði bilframleiðarum, at bæði framjós og bakljós á øllum nýggjum bilum skuldi tendra sjálvvirkandi. Reglan skal fyribyrgja vanlukkur orsakaðar av manglandi ljósi. Men enn koyra nógvir bilar á vegunum, sum eru framleiddir áðrenn. Vit mintu bilførarar ár bakljósini í heyst við útvarpslýsingum og á facebook.

### Samstarv við fyritøkur

Okkara motivatión fyri at samstarva við fyritøkur er, at gransking vísur, at í 35% av deyðsvanlukkum í ferðsluni er vinnuakfar partur av vanlukkuni. Endamálið við samstarvi við fyritøkur er at betra atferð í ferðsluni hjá vinnuakførum. Innihaldið í samstarvi við fyritøkur er:

1. Váðaprofilur. Við amboði hjá systurráðnum í Danmark, Sikker Trafik, verður gjørdur váðaprofilur út frá svarum hjá starvsfólki um teirra hugburð/atferð í ferðsluni
2. Endurskoðan ella áseting av koyripolitikki
3. Innanhýsis átøk – átøk hjá RFF verða sjónlig á fyritøkum

Í 2016 byrjaði RFF royndarverkætlan saman við SEV, har vit royndu omanfyristandandi. Í 2017 eydnaðist at byrja samstarv ið tvær fyritøkur afturat. Hesum arbeiði halda vit fram við.




## Afturvendandi átøkini

### Ferðsludagar fyri 8. floksnæmingum





Ferðsludagarnir vórðu hildnir fyri 8. flokkum eins og undanfarin ár. Tiltakið er samskipað av Ferðslutrygd og stuðlað av Trygd og Betri Trygging.





### 1-1-2 dagar

RFF tók lut á árligu 1-1-2-døgnum, har løgreglan, brandstøðin, sjúkraflutningstænastan og Ferðslutrygd møta elstu barnagarðsbørnunum. Dagurin varð hildin í Badmintonhøllini í Havn, Mentanarhúsinum í Fuglafirði og í Skálavík.





### Súkkluhjálmar, endurskinsvestar og taskuendurskin til 1. floksnæmingar

Sum helst tey einastu í heiminum fáa øll børn í Føroyum, sum fara í 1. flokk, hvør sín hjálm til gávus í samstarvi millum Betri Trygging og Trygd. Á myndini eru tað næmingar í Hósvíkar skúla.

Í samstarvi við Betri Trygging hevur Ráðið í mong ár latið øllum 1. floksnæmingum endurskinsvestar og taskuendurskin. Her næmingar í Vestmanna skúla




**Hvørjum halda fólk á facebook, at RFF skal leggja seg eftir í 2018?**
Hetta spurdu vit á facebook beint fyri nýggjár. 145 viðmerktu spurningin, og her er tikið saman um tey svarini, sum gingu ofta aftur:




Við støði í hesum og samanborið við vanlukkufaktorar í grannalondum okkara, samdist nevndin um at virka fyri at fáa í lag átøk innan hesi øki í 2018:

- Møði
- Meira tolsemi/fyrilit
- Halda frástøðu
- Sløkt bakljós
- Fokus á endurskin

Hetta kemur ikki í staðin fyri, men umframt verandi virksemi, sum nevndin hevur sett sær fyri.

**Framlítandi virksemi RFF**
At ferðsluárið 2017 við tveimum deyðum er nakað undir miðaltalið á deyðum er jaligt, men langt frá málinum. Yvirskipaða framlítandi stavnhald hjá Ferðslutrygd verður móti økjunum børn, ung og samstarv við fyritøkur. Harumframt verður virkað dyggiliga á øðrum økjum so sum: ferð, rúsdrekka, gáloysni og undirvísing í fólkaskúlanum. Átøkini skulu vera støðug og áhaldandi fyri at tryggja bestu fortreytir fyri betraðum vanum í ferðsluni.

Við góðu royndunum við samstarvi við kommunum um vegplakatir frá í fjør og 2016 er ætlanin at gera tað til fastan tátt at bjóða kommunum at vera við í landsfevnandi átøkum ljósu tíðina. Málið er at fáa allar kommunur við.

## Hvussu nærkast vit nullhugsjónini?

Ráðið fyri Ferðslutrygd metir, at hesi stig eru tey mest átroðkandi at virka fyri fyri at røkka nullhugsjónini um at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein í vegaflutningsskipanini.

Tey trý ovastsu stigini eru **sjálvsagdar fortreytir** hjá øllum grannalondum okkara fyri arbeiðnum at skapa tryggar vanar í ferðsluni:

*1. Ferðslutrygdarætlanin dagførd*

Tað er umráðandi, at ferðslutrygdarætlanin, sum gekk út í 2015, verður dagførd. Tað eigur at vera øllum greitt, hvørji yvirskipað tiltøk, ið partarnir, ið varða av ferðslutrygdini, meta hava størst týdning. Tað er ikki nóg mikið at siga, at eingin skal doyggja í ferðsluni. Vit mugu eisini kunna svara upp á, *hvussu* vit vilja røkka málinum. Viðkomandi partar at dagføra ferðslutrygdarætlanina eru: Landsverk, kommunuumboð, løgreglan, Akstovan og Ferðslutrygd. Landsstýrið er umboðað í stýrisbólki. Nýggj vitan og nýggjar royndir hjá grannalondum eiga at verða greinaðar í mun til Føroyar.

*2. Hagtøl skipað og nágreinað*

Hagtøl mugu verða skipað og raðfest av viðkomandi pørtum: Løgreglu, sjúkrahúsum og Landsverki. Hesir partar eiga í nógv størri mun at framleiða, greina og samstarva um hagtøl.

*3. Skaðanevnd til álvarsligar vanlukkur*

Vit vita alt ov lítið um, hvørjar orsakir eru til ferðsluvanlukkur í Føroyum, og í hvønn mun tær koma fyri. Alt ov nógv vitan fer fyri skeyti, sum kundi givið okkum innlit í okkara støðu, og soleiðis møguleika at fyribyrgja vanlukkum.

*4. Fleiri kunningarátøk*

Kanningar vísa, at í umleið 90% av deyðsvanlukkum í ferðsluni eru menniskanslig mistøk partur av orsøkini. Tó at hugburðarkanningar okkara vísa, at tað gongur rætta vegin við hugburði til til dømis ferð, rúsdekka og fartelefonir í ferðsluni, hava framvegis mong fyri neyðini at verða mint á trygga atferð í ferðsluni.

*5. Meiri løgreglueftirlit*

Løgreglan ger eitt stórt og týðandi arbeiði í ferðsluhøpi, sum tíbetur er sjónligt, eisini í miðlum. Tað er væl og virðiliga skjalprógvað, at kanst tú vænta at møta løgregluni í ferðsluni, hevur tað ávirkan á, hvussu tú ber teg at í ferðsluni. Tí er týðandi, at løgreglan er sjónlig og javnan ger kanningar um alt landið.

*2. februar 2018*
*Raðið fyri Ferðslutrygd*